# Umsíðir eydnaðist tað



Mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** Fyri fyrstu ferð síðan tann 10. november í fjør fekk StÍF stig í landskappingini. Avrikið var sannførandi móti Kyndli

Uni Holm Johannesen

Besta kvinnuliðið hjá StÍF hevur havt ómetaliga lítið at fegnast um seinastu mánaðirnar. Sigurin á Kyndli um vikuskiftið var tann fyrsti í hesum kappingarárinum. Eitt stig var í skjáttuni undan dystinum. Tað var óvæntaði javnleikurin á útivølli móti Tjaldri. Tá varð Bogdan Burcea sagdur úr starvinum sum venjari hjá Tjaldri. Tá var dagurin 10. november 2010.

Fimm mánaðir seinni, tann 13. mars 2011, fekk StÍF umsíðir aftur stig.

### Stríddust væl

Kyndil kom illa frá byrjan og legði fyri við fleiri mistøkum. Tað gav StÍF ein fyrimun beinanveg, og tað tóktist sum, at gestirnir høvdu ikki yvirskot til at vinna seg aftur.

Kyndil var ikki til reiðar, er einfalda niðurstøðan.

Tað hevur sjálvsagt sína ávirkan á seinastu landskappingardystirnar, at tað er einki at spæla fyri. Satt at siga, hava øll liðini, uttan Stjørnan, Tjaldur og Neistin, havt lítið at spælt fyri seinastu mánaðirnar. Eingin flytir, eftir øllum at døma, niður í næstbestu deildina.

Hinvegin skal einki takast frá StÍF, sum stríddist væl, og hóast støðuga mótburðin varðveitir góðan hýrin og roynir at geva hinum liðunum mótstøðu.

uni@sosialurin.fo

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 19 | 538 | 442 | 96 | 32 |
| 2 | Neistin | 20 | 561 | 459 | 102 | 30 |
| 3 | Tjaldur | 19 | 543 | 447 | 96 | 30 |
| 4 | VB | 20 | 502 | 498 | 4 | 20 |
| 5 | Kyndil | 20 | 460 | 490 | -30 | 14 |
| 6 | VÍF | 19 | 423 | 533 | -110 | 7 |
| 7 | StÍF | 19 | 377 | 535 | -158 | 3 |



*Neistakvinnur bukaðu gulu gestirnar úr Vestmanna*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sorl

**HONDBÓLTUR** Neistin bukaði kvinnurnar úr Vestmanna og vann stórsigur, tá VÍF vitjaði í høllini á Hálsi í gjár

Uni Holm Johannesen

Heili 19 mál vóru á muni, tá Neistin vant burtur úr VÍF í gjár. Nógv meira er ikki at siga um tann dystin.

Nú stundar av álvara til avgerðin fellur, hvørji lið skulu spælast finalurnar um føroyameistaraheitið. Stjørnan og Tjaldur hava fimm dystir eftir at spæla, og Neistin manglar fýra dystir. Tvey stig skilir ovastu liðini.

Mikudagin er longu ein dystur aftur á skránni. Tá verður grannauppgerð í høllini á Hálsi. Kyndil skal royna at leggja fót fyri grannunum.

### Eingin ivi

Hesa ferð var eingin sum helst ivi um, hvar stigini skuldu. Tá VÍF fekk sítt triðja mál, hevði Neistin longu skotið 15 mál. Tí royndu gestirnir úr Vestmanna bara at avmarkað tapið.

Heimaliðið fór niður í ferð eftir steðgin, og og tá var munurin ikki eins stórur, hóast Neistin økti um leiðsuna.

uni@sosialurin.fo

# Stjørnan hevur munin

**HONDBÓLTUR** Tað var lítil ferð á spælinum, og nógvu mistøkini darvaðu serliga, tá Stjørnan koppaði vágskvinnum. Klaksvíkskvinnur hava munin í oddastríðnum

Uni Holm Johannesen

Stjørnan er oddaliðið í bestu kvinnudeildini. Kvinnurnarnar úr Klaksvík hava vunnið sær lítlan fyrimun, nú seinastu fimm dystirnir skulu avgreiðast næstu vikurnar.

Stjørnan er tvey stig framman fyri Neistan og Tjaldur. Tað kann vísa seg at verða serliga umráðandi, tí tað eru nummar eitt og tvey, sum sleppa í finalurnar um føroyameistaraheitið. Stjørnan kann tí loyva sær at snáva einaferð, tí annað hvørt Neistin ella Tjaldur missa stig, tá hesi liðini hittast sunnudagin.

### Uppiborin sigur

Stjørnan vann á VB í KÍ-høllini. Dysturin var javnur, men spælið var serliga merkt av mistøkum. Í álopsspælinum vóru fleiri skeivar sendingar, og verjuspælið hjá báðum liðunum var lítið sannførandi.

VB var omaná fyrstu løtuna, men heimaliðið fór upp í ferð og var tvey mál framman fyri í hálvleikinum. Miðskeiðis í seinna hálvleiki vóru gestirnir úr Vági brádliga á odda við einum máli, 18-17, men so fóru føroyameistararnir aftur undan, og tá kláraðu vágskvinnur ikki at hótta leiðsluna.

Fimm dystir eru eftir at spæla. Stjørnan er framvegis nummar eitt, og hevur ein lítlan fyrimun, sammett við hini bæði liðini.

uni@sosialurin.fo

### Neistin – VÍF
36-17 (19-4)

Dómarar: Heri Petersen og Dánjal Samuelsen

**10 min.: 7-1**
**20 min.: 15-2**
**40 min.: 23-6**
**50 min.: 29-12**

**Neistin:** Barbara Brauer 9, Jacklin Durhuus 7, Nicoletta Hansen 5, Birita Wardum 4, Lovisa Andreasen 3, Jenny Kragesteen 2, Elin Holm 2, Bára Hansen 2, Unnur Danielsen 1, Rakul Magnussen 1.
**VÍF:** Agnas Olsen 10, Halla Midjord 3, Elisa Leo 2, Liljan Djurhuus 1, Torgunn Johansen 1,
Útvísingar: Neistin 4, VÍF 1.

### StÍF – Kyndil
21-22 (15-12)

Dómarar: Kristian Joensen og Karstin Joensen

**10 min.: 5-4**
**20 min.: 11-8**
**40 min.: 18-15**
**50 min.: 22-18**

**StÍF:** Rebekka Justinussen 10, Bára Berthelsen 5, Fríðrún Danielsen 4, Birna Tummasadóttir 2, Birita Poulsen 2, Mariann Petersen 2, Lilja Gregersen 1.
**Kyndil:** Heidi Maria Akselsen 9, Anja Heinadóttir 5, Randi S. Wardum 4, Rannvá Carlsen 2, Jórun Ludvig 1, Ásleyg Súnadóttir 1.
Útvísingar: StÍF 4, Kyndil 2.

### Stjørnan – VB
24-21 (13-11)

Dómarar: Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen

**10 min.: 1-4**
**20 min.: 7-7**
**40 min.: 18-13**
**50 min.: 22-19**

**Stjørnan:** Valentina Suciu 10, Durita Ljósstein 4, Judit Hansen 3, Alina Anghel 3, Anna Kristina Samson 2, Durita Mikkelsen 2, Bára S. Klakstein 1, Una Olsen 1.
**VB:** Gintare Lydekaite 9, Justina Balzarciute 4, Rannvá Johannessen 3, Gurið Mortensen 3, Laila Jepsersen 2.
Útvísingar: Stjørnan 3, VB 2.